LM-099/2023

Annika Petersen

Fylgiskjal 40

Fra: Tórir Michelsen
Sendt: 22. februar 2024 14:25
Til: Annika Petersen
Cc: Bjarni Askham Bjarnason; Bára Michelsen
Emne: SV: Uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (ferðavinnulógin) til hoyringar

Góðan dagin,

Fíggjarmálaráðið hevur fingið uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (ferðavinnulógin) til hoyringar.

Fíggjarmálaráðið vísir til hoyringssvar frá TAKS ísv. umsiting av einum møguligum náttúrugjaldi, sum skotið verður upp í lógaruppskotinum.

TAKS vísir millum annað á hesi viðurskiftini í sambandi við náttúrigjaldið, sum skotið verður upp í lógaruppskotinum:

Fyrst og fremst er at siga, at tað eru flutningsfyritøkurnar, sum skulu uppkrevja gjøldini – ferðagjald og náttúrugjald. Leikluturin hjá TAKS er at tryggja, at gjaldið verður uppkravt rætt og rindað landskassan. Kunnu flutningsfyritøkurnar uppkrevja náttúrugjaldið, so kann TAKS føra eftirlit.

Ein grundleggjandi munur millum ferðagjald og náttúrugjald er, at náttúrugjaldið verður álagt tann ferðandi við komu til Føroya, meðan ferðagjaldið verður álagt flutningsfyritøkuna, sum flytur ferðafólk úr Føroyum. Tað er lættari at hjá TAKS at fyrihalda seg til, at tað er flutningsfyritøkan, sum stendur til svars fyri gjaldinum (í mun til innheinting). Eisini vil vera lættari um bæði gjøldini verða uppkravd antin við komu ella við fráferð, og ikki eitt við komu og eitt við fráferð, og leggur ferðavinnulógin eisini upp til, at gjøldini verða uppkravd saman eftir II. um ferðagjald.

Yvirskipað er at siga, at hugtakið ferðafólk, og hvussu tað skal tulkast, hevur stóran týdning fyri, í hvønn mun uppkrevjingin kann umsitast. Tí mælir TAKS til, at hugtakið ferðafólk verður útgreinað.

Í II. um ferðagjald fevnir hugtakið ferðafólk um øll ferðandi, herundir føroyingar. Tó er undantak fyri børn undir 12 ella 16 ár fyri ávikavist loftvegis ella sjóvegis flutning, fólk í transit og tey, sum ferðast í fari, sum ikki vanliga verður nýtt til ferðafólkaflutning.

Skal hugtakið ferðafólk tulkast eins og í II. um ferðagjald, so kunnu flutningsfyritøkurnar helst loysa uppgávuna við at leggja eitt nýtt (náttúru)gjald á hvønn ferðaseðil. Tó so at børn millum 12-16 ár, sum ferðast loftvegis, skulu rinda ferðagjald men ikki náttúrugjald. Um ætlanin er, at ferðafólk við cruise-skipum einans skulu rinda, um tey fara í land (hetta er ógreitt), vil tað hinvegin óivað gera umsitingina truplari. Til seinast er einki undantak í ferðavinnulógini fyri tey, sum ferðast í fari, sum ikki vanliga verður nýtt til ferðafólkaflutning, og tað eigur helst at vera eitt tílíkt undantak.

Um ynskið er, at føroyingar ikki rinda náttúrugjald, má tað gerast greitt í uppskotinum. Tá ber ikki til bert at áleggja eitt gjald á hvønn ferðaseðil. Passupplýsingar, sum flutningsfyritøkurnar fáa, eru ikki nóg mikið til at staðfesta, hvar tey ferðandi búgva.
Undantak fyri ferðandi við danskan (og íslendskan) ríkisborgararætt er helst ikki ein loysn, tí nógv eru búsett í Føroyum uttan at hava ríkisborgararætt. Men flutningsfyritøkurnar mugu vera tey nærmastu at meta um, í hvønn mun gjaldið kann uppkrevjast.

Ein onnur viðmerking er, at ferðavinnulógin sum nevnt ásetur, at nátturugjaldið verður kravt inn saman við ferðagjaldinum eftir II. um ferðagjald.
Lógaruppskotið eigur tískil eisini at útgreina leiklutin hjá TAKS, heimildirnar hjá TAKS, at gjaldið skal rindast landskassan og møguleikan fyri panting.

Harafturat ivast Fíggjarmálaráðið í, um upphæddin 10 mió. kr. árliga verður nóg mikið til at byggja gongugøtur o.a. til tey mest vitjaðu ferðamálini o.a. í landinum, og har tørvurin er.
Fíggjarmálaráðið mælir til at kannað verður gjølliga, um upphæddin kann væntast at vera nóg mikið og í mun til tørv og ynski.
Víst verður eisini á, at summi støð er tørvur helst eisini á øðrum undirstøðukervi enn bara gongugøtur. Til dømis møguleikar at fara á vesi, skúrar til gangandi at bíða í, parkeringsøki o.a.
Harafturat skal Fíggjarmálaráðið vísa á, at neyðugt verður at seta eina ávísa upphædd av árliga til rakstur av tí undirstøðukervi ísv. ferðavinnuna, sum ætlanin er at byggja.

At enda mælir Fíggjarmálaráðið til at kanna, um til ber at spjaða ætlaða náttúrugjaldið á einar 2-4 aðrar møguligar inntøkur og gjøld, sum kunnu koma í staðin fyri og møguliga aftrat ætlaða náttúrugjaldinum.
Fíggjarmálaráðið metir, at hetta hevði givið eitt tryggari, breiðari og meira rættvíst inntøkugrundarlag ísv. bygging av undirstøðukervinum til ferðavinnuna, sum neyðugt er at byggja.

Nakrar aðrar inntøkukeldur og avgjøld kundu til dømis verið

- At hækka verandi ferðaavgjald
- Gjald á gistingar á hotellum og leigaðum íbúðum/húsum (stutttíðarleigu), til dømis fyri hvørja nátt, gist verður
- Gjald á útlendskar bilar í Føroyum
- (Generelt og samskipað) Gjald fyri atgongd at fara fjallatúrar í Føroyum

Fíggjarmálaráðið mælir til at kanna, um til ber við fyrimunum at seta eitt møguligt náttúrugjald saman við uppskotunum til gjøld nevnd omanfyri.

Tórir Michelsen
Fulltrúi / Advisor
Office: +298 352020
Mobile: +298 552011
torir@fmr.fo

FØROYA LANDSSTÝRI
The Government of the Faroe Islands

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance
Tinganes / FO-100 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 352020 / fmr@fmr.fo / www.fmr.fo

Fra: Annika Petersen <AnnikaP@uvmr.fo>
Sendt: 25. januar 2024 23:04
Til: sigert@bondi.fo; Bára Gunnarsdóttir <Bara@industry.fo>; hilda@kallnet.fo; fo@mail.fo; Niels Thomas Pedersen

LM-099/2023

<jallur53@gmail.com>; Rúna Hjelm <runahjelm@gmail.com>; kf@kf.fo; Kundatænastan á TAKS <taks@taks.fo>; booking@smyrilline.fo; administration@atlantic.fo; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Løgmálaráðið <lmr@lmr.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>; Barna- og Útbúgvingar Málaráðið <bumr@bumr.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; industry@industry.fo; utoyggj@gmail.com
Emne: Uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (ferðavinnulógin) til hoyringar

¨Til hoyringarpartarnar.

Viðhefta uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (ferðavinnulógin) verður hervið send tykkum til hoyringar.
Hoyringarfreistin er sett til **hósdagin 22. februar kl. 15:00.**

Vinaliga sendið møguligar viðmerkingar til uvmr@uvmr.fo

Vinaliga
Annika Petersen
Uttanríkis- og vinnumálaráðið.